


**Nr. 23** *5. novembur 2023* **83. árg.**

# Jesus undirvísir

Lærusveinarnir spurdu: „Hvat er tekinið fyri komu tína og veraldar enda?“ (Matt. 24,3). Og Jesus svaraði: „Lærið líknilsið av fikutrænum. Tá ið gróðurin er komin í greinarnar, og leyvið fer at spretta, tá vita tit, at summarið er í nánd. Soleiðis skulu tit eisini vita, at tá ið tit síggja alt hetta henda, tá er hann í nánd, fyri durunum. Sanniliga sigi eg tykkum: henda ætt skal ikki ganga undir, fyrr enn alt hetta hevur hent.“ (Matt. 24,32–34).

Jesus talar her um eina tíð í søgu Ísraels, „tá ið greinarnar hava fingið sevju, og bløðini spretta.“ Fikutræið er ein mynd upp á Ísrael (Hós. 9,10). Á Jesu døgum hevði Rómverjaríkið valdið í Ísrael, og í næstan 2000 ár (frá ár 70) hevur fólkið verið spjatt út um allan heimin. Við øðrum orðum hevur einki lív verið í fikutrænum øll hesi árini. Jesus sigur, at hetta er eitt „líknilsi“, sostatt brúkar hann fikutræið sum eina mynd av Ísrael.

14. mai 1948 fingu jødar land sítt aftur. Lív kom í fikutræið. Tá fór klokkan í gongd móti endatíðini. Mong eru teknini, sum vísa, at vit eru komin inn í endatíðina. Ísrael er sterkasta teknið, sum peikar á Jesu afturkomu. Jesus talar her um eina framtíðar ætt. „Henda ætt skal ikki ganga undir, fyrr enn alt hetta hevur hent.“ Matt. 24,34.

Hann tosar um eitt ættarlið, sum er á lívi, tá ið fikutræið livnar aftur. Eftir at jødarnir fingu landið aftur, fór at spíra og vaksa í turrum pørtum í landinum. Ezekiel 36,8–12. Harumframt bleiv eitt fólk endurføtt. Tey deyðu beinini í dalinum blivu savnað aftur og lív kom í tey í Ez. 37,12–14. Tað byrjaði 14. mai 1948, tá ið jødarnir fingu land sítt aftur. Tann 14. mai

2018 hildu teir 70 ára stovningardagin. Hvat merkir orðið „ætt“ her? Svarið finna vit í Sálmi 90,10: „Sjúti (70) ár er æviskeið várt, og um mikil er megin áttati (80) ár.“

Livialdurin kann vera ymiskur frá persóni til persón. Áttati er nevnt sum eitt vanligt mark uppeftir, men summi liva enn longur. Vit kunnu tí ikki siga neyvt, nær markið hjá eini „ætt“ er, men Móses sigur, at tað er upp til 80 ár, um leið. Nú eru 75 ár farin, síðani Ísrael fekk land sítt aftur.

Vit eru nú við endan av tí „ætt“, sum sær alt hetta henda, og Jesus sigur, at áðrenn útgangin á einari slíkari „ætt“, fer hann at koma aftur: „Sanniliga sigi eg tykkum: henda ætt skal ikki ganga undir, fyrr enn alt hetta hevur hent.“ (Matt. 24,34). Lærusveinarnir spurdu um tekinið fyri Jesu komu (Matt. 24,3). Nú høvdu teir fingið greitt svar.

Vit mugu brúka ta stuttu tíðina, til tað sum hevur størstan týdning: Gera okkum til reiðar, umvenda okkum, játta syndir okkara og gera alt, vit kunnu at bera evangeliið til allan heimin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kamelurin og maðurin

Niðri í Egyptalandi stóð ein maður og arbeiddi inni í einum tjaldi. Tá ið hann vendi sær á, sá hann ein kamel, sum hevði stungið trantin inn um tjalddyrnar. „Far út við tær,“ segði maðurin, „eg tími ikki at hava ein kamel her.“

„Á, lova mær bara at hava trantin inni, tí tað er so kalt,“ bað kamelurin. „Alt í lagi,“ segði maðurin og arbeiddi víðari.

Løtu seinni sá hann, at kamelurin hevði stungið alt høvdið innum. „Nei, hatta gav eg tær ikki loyvi til,“ segði maðurin. – „Tað er so kalt, tað bilar einki, um høvdið er innanfyri,“ svaraði kamelurin. – „Ja, ja, so siga vit tað, men so heldur ikki meira,“ svaraði maðurin.

Ein løta gekk, og tá sá maðurin, at allur hálsurin á kamelinum var komin innum. „Hatta var ikki ætlanin,“ segði maðurin. „Tað er so kalt, eg má verma meg eina løtu,“ segði kamelurin. „Ja, ja, bara eina løtu,“ segði maðurin og arbeiddi víðari.

Brádliga kom hann at hyggja yvir at tjalddurunum, tí hann hoyrdi sovorðið skav haðani. Tá sá hann, at kamelurin hevði stungið annað beinið innum. Nú bleiv maðurin óður, tók eina tjúkka grein og fór yvir ímóti kamelinum og skuldi sláa hann;

men nú var ov seint, tí áðrenn hann náddi yvir til hansara, hevði hann fingið hitt beinið innum, og nú var tað ikki maðurin, ið rendi kamelin út, men kamelurin, ið rendi mannin út.

Hygg, hetta var eitt líknilsi. Tað er eisini ein, ið stendur uttan fyri okkara hjartadyr og roynir at sleppa innum, og tað er Illimaður. Hann roynir at tøla okkum við ymiskum. T.d. kann hann siga: „Tak bara handa lítla lutin uppi á hillini í handlinum. Hann er so lítil, hann hevur einki upp á seg." Men tað er kavablakið, ið skjótt vindur upp á seg, og áðrenn vit næstan hava umrátt okkum, eru vit tjóvar. – Ella hann kann siga: „Drekk bara eina ølfløsku." Men vit mugu vera á varðhaldi og ansa okkum, tí annars fær hann fótin fyri seg og kemur innum sum kamelurin, og so er tað hann, sum stýrir øllum, og ikki vit. So verða vit bundin av rúsdrekka og kunnu ikki lata fløskuna standa, tá ið harri okkara „kamelurin" gevur boð um at drekka.

Um vit geva einum skeivum tanka rúm, kann lættliga enda galið. Soleiðis gekst Sáuli kongi. Bíblian sigur, at hann var ein góður og dugnaligur kongur. Men tað helt hann ikki á at vera. Hví? Tí hann gav øvundsjúkuni rúm, og so fekk hon høvdið fyri seg, og mangar óndar gerðir spurdust burtur úr tí, og endin gjørdist syrgiligur.

Latum okkum tí vera varin og ikki loyva „kamelinum" so frægt sum at stinga trantin inn um dyrnar.

*Effie Campbell* umsetti.

# Niður á knæ, rópa til Gud!

*Steinar Harila*

Kyősti Kallio var forseti Finnlands frá 1937–1940, í einari tíð, har bæði Sovjetsamveldið og Týskland hóttu Finnland. Forsetin og kona hansara vóru trúgvandi og virkin kristin. Í almenna útvarpinum bað Kallio fólkið fara at lesa í Bíbliuni og fara niður á knæ og rópa til Gud. Og fólkið fór undir at søkja Gud í stórari neyð. Tey stillaðu seg í skarðið, sum ein vernd fyri fólkið.

Hvør skal leiða norska fólkið í bøn? Vit kunnu vraka Gud, men Gud hvørvur ikki fyri tað. Vit skulu øll somul standa framman fyri Gudi. Nú standa vit framman fyri einum vali. Vit mugu savnast og lata kristnu virðini standa fremst.

Vit mugu lyfta kristna arvin, og vit mugu raðfesta. Vit mugu niður á knæ og víga okkum til Guds. Tí søkið fyrst Guds ríki, so skalt tú fáa alt annað, tær tørvar umframt. (Matt. 6,33). Vit skulu ikki fordøma, men fyri Guds sakir og landsins skuld, mugu vit reisa okkum og ikki lata okkum lumpa.

*Effie Campbell* umsetti.

# Dagliga andaktin

*„... verðið umskapaðir við endurnýggjan av hugi tykkara, so at tit mega fáa at royna, hvat ið er Guds vilji.“ Róm. 12,2.*

Tað, sum vit gera soleiðis av og á, tað er ikki tað, sum ger munin. Tað er tað, sum vit gera hvønn dag, sum broytir okkurt. Finn tær eitt stað, har tú kanst vera einsamøll við Gudi – hvønn dag. Um tað er neyðugt, koyr so út til eitt friðarligt stað ella spáka tær ein túr einsamøll. Tú ert tað verd! Og royn so at lesa dagsins andaktsstykki tvær ferðir. Tú fert at gerast ovfarin at síggja, hvat ið tú fært burtur úr tí aðru ferð – sovorðið, sum tú ikki fekst við fyrru ferðina. Um okkurt serligt loypur í eyguni á tær og talar persónliga til tín, strika undir tað. Tá ið tú hevur lisið stykkið, bið so einar tveir minuttir yvir tí, tú hevur lisið. Tú skalt ikki vera „religiøs“ – tosa bara við Gud, sum tú hevði ætlað tær at tosa við ein góðan vin.

„Grasið visnar, blóman følnar, men orð Guds várs stendur allar ævir.“ Jes. 40,8.

*„... et Ord til Dagen“* – *Effie Campbell* umsetti.

---

Ljósið varð skapt fyrsta dagin, og Jesus, sum er heimsins ljós, reis eisini upp fyrsta dagin í vikuni.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. nov. | **Tekstur:** | Opb. 7, 13–17; 21, 1–5 | **Bíbliuorð:** | Áps. 2,21 |
| 12. nov. | **Tekstur:** | Matt. 26, 26–29 | **Bíbliuorð:** | Jóh 6,48 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 24** ***19. novembur 2023*** **83. árg.**

# Í einari tíð sum hesari

*Carl Gustav Severin*

Alt her á jørðini er komandi og farandi. Tað er uppi eina tíð, og so hvørvur tað. Stalin, Hitler og aðrir komu og fóru. Men tað eru trý ting, sum ongantíð fara at hvørva: „Men nú verða tey verandi, **trúgv, vón og kærleiki**, hesi trý, men størstur av teimum er kærleikin." 1. Kor. 13,13.

**Trúgvin** verður fyrst nevnd her. Menniskjuni eru so erpin og nakkafatt og vilja trumfa sítt ígjøgnum. Tá gongur ongantíð gott. Hví? Tí Skriftin sigur: „Gud stendur hinum stoltu ímóti, men gevur eyðmjúkum náði." Ják. 4,6 V.D.

Serkønir handverkarar av øllum slagi bygdu Titanic, sum var heimsins flottasta skip í síni tíð, úr besta tilfari. Men tað megnaði ikki so frægt sum at gjøgnumføra ein túr. Hví? Gud stendur teimum stoltu ímóti. Á netinum lesa vit, at ein í reiðarínum segði: „Ikki eingang Várharra kann søkkja hetta skipið." Harafturímóti bygdu Nóa og synir hansara, sum als ikki vóru serkønir, men bara vanligir arbeiðsmenn, ørkina, og hon sigldi trygt ígjøgnum størstu ódn, sum henda jørð nakrantíð hevur upplivað. Hví? Tí tað er teimum eyðmjúku, Harrin sýnir náði.

Nóa hevði sanniliga trúgv. Hann bygdi hetta stóra skipið langt inni í landinum, og hann hevði ongantíð sæð regn. Í 120 ár smíðaði hann, og øll hesi árini prædikaði hann fyri fólkinum, men tey vildu ikki lurta. Tey bara flentu og hildu, at maðurin var klikkaður.

Trúgv er at líta á Gud. Hann er tryggur, álítandi og sterkur. Hann gongur við mær. Hann ber meg. Men hevur tú trúaranda,

so eru tað ikki øll í samkomuni, sum taka undir við tær. Káleb og Jósva høvdu trúaranda. Teir tosaðu positivt um Kánáan, men hinir 10 njósnararnir tosaðu negativt og knarraðu eins og ein gomul hjalshurð. Tað, sum hjálpir upp á knarrið, er at stoyta olju á, so knirkar hurðin ikki longur, og soleiðis er tað eisini, tá ið tað ræður um menniskju. Skal tað negativa prátið og knarrið halda uppat, mugu vit biðja um eina Andans úthelling. Tá ið oljan flýtur, hvørvur knarrið, og tá ið Heilagi Andin fellur, hvørvur grenjið, og tað verður gott í samkomuni. Knarrið kostaði Ísraels fólki ein túr upp á 40 ár í oyðimørkini. Tað er ein Kálebs anda, okkum tørvar í samkomunum í dag.

*Effie Campbell* umsetti.

# Flyt ikki markasteinarnar

*Carl Gustav Severin*

Hvussu er tað vorðið við gudsótta í lívi okkara í dag? Í Jes. 5,20 stendur: „Vei teimum, ið kalla hitt illa gott og hitt góða ilt, sum gera myrkur til ljós og ljós til myrkur, gera beiskt til søtt og søtt til beiskt.“ Og í Orðt. 22,28 stendur: „Flyt ikki avgomul markaskjal, sum fedrar tínir hava sett.“ Boðanin í dag flytur markasteinarnar, t.d. er markið flutt, tá ið boðað verður um Ísrael. Harrin sigur, at Ísrael er ognarfólk hansara (5. Mós. 26,18 o. o.), og vit eru kallað at vælsigna Ísrael. Tað verður lítið boðað um tekn og undur. „Teir dvaldust tá har eina langa tíð og talaðu við góðum treysti í Harranum, sum **gav orðinum um náði sína vitnisburð**, við tað at hann **læt tekin og undur** henda við hondum teirra.“ Áps. 14, 3 Gud staðfesti altso orðið, ikki við sangi ella nøkrum øðrum, men við undrunum.

Alt hongur saman: sál, likam og andi. „Hann fyrigevur øll misbrot tíni og grøðir allar sóttir (sjúkur) tínar.“ Sálm. 103,3.

Eg var boðin til Russlands at prædika. Aftaná ætlaði eg at biðja fyri sjúkum. Men presturin segði: „Nei, tað gongur ikki. Tað vil KGB ikki loyva.“ – „Tað skalt tú einki leggja í, tí KGB merkir „Karl Gustav Bestemmer“, so eg taki ábyrgdina av tí. Tað gjørdist eitt signað møti, har øll blivu frísk. Tað havi eg ikki upplivað hvørki fyrr ella síðani. Tað hendir nógv ógvisligt í verðini í dag. Tað skulu vit ikki ræðast, men vit skulu hava virðing fyri tí.

*Effie Campbell* umsetti.

# Miss ikki ein vin

*Carl Gustav Severin*

*„Men nú verða tey verandi,* **trúgv, vón og kærleiki***, hesi trý, men størstur av teimum er kærleikin.“ 1. Kor. 13,13.*

Fyri fleiri árum síðani hendi tað, at fleiri komu til mín og søgdu, at ein maður í samkomuni gekk runt og baktalaði meg. Eg havi ofta gjørt mangt skeivt, men hetta, sum hann baktalaði meg fyri, hevði eg yvirhøvur ikki gjørt. Eg bleiv rasandi og gjørdi av at ringja til hansara og siga honum, hvat eg helt um sovorðnar lygnir.

Eg tók rørið og skuldi snara nummarið. Tá hoyrdi eg Heilaga Andans rødd siga: „Hvat gert tú?“ – „Eg ætli mær at siga honum sannleikan.“ – „Tað er mín sannleiki, sum setur fólk í frælsi, ikki tín. Legg rørið á,“ segði Harrin. – „Ja, men hvat skal eg so gera?“ spurdi eg. – „Hvat hevur tú í frystiboksini?“ spurdi Harrin. – „Ein grís upp á 40 kg,“ segði eg. – „Tak hann og koyr hann í ein posa og vælsigna bróður tín í Harranum við tí gávuni.“ – Eg mundi dána, tí jólini vóru í hondum, og hetta var jólamaturin hjá okkum.

Men eg gjørdi, sum Harrin segði. Maðurin búði uppi á 4. hædd, og eingin lyfta var í húsinum, so eg mátti slabba hesa tungu byrðu upp gjøgnum allar trappurnar. Eg bankaði uppá, og hann kom út og læt hurðina upp. „Hvat vilt tú?“ spurdi hann bilsin.

„Eg elski teg, bróður,“ segði eg. Eg vildi helst havt sagt honum nøkur borgarlig orð, men tað var trúarandin, sum fekk meg at siga hatta. „Eg vil vælsigna tykkum við jólamati og gevi tykkum henda grísin. Mugu tit hava eini signað jól í Harrans navni, kæri bróður.“ So skuldi eg snara mær á og fara.

„Kom inn,“ segði hann, og so sótu vit og prátaðu í fýra tímar. Vit blivu vinir fyri lívið. Um eg ikki hevði gingið í meg sjálvan og eyðmýkt meg, so var hatta vinarlagið farið fyri skeyti. Vit kunnu vinna eitt stríð, men missa ein vin. Hann hevði feil, og eg hevði rætt, men tað hevur einki at siga. Viðhvørt eri tað eg, sum geri okkurt skeivt, og viðhvørt eru tað onnur, sum gera okkurt skeivt. Vit mugu lata kærleikan flóta. Vit mugu lata fyrigevingina flóta. Størstur er kærleikin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fyridømi fyri annað ættarlið

*Carl Gustav Severin*

Vit skulu elska allan Kristi kropp, ikki bara okkara egnu meinigheit. Skrivað stendur: „Dømið ikki, at tit ikki skulu verða dømd; tí at við tí dómi, tit døma, skulu tit verða dømd, og við tí máli, tit mála skal tykkum verða mált.“ Matt. 7,1–2. – „Tí at um tit fyrigeva monnum misgerðir teirra, so skal himmalski faðir tykkara eisini fyrigeva tykkum.“ Matt. 6,14. Náðin er eingin fríbillett til at liva í synd. Vit skulu minnast til, at einaferð standa vit við tí allar seinastu billettini, har vit ikki venda aftur og einki kunnu taka við okkum.

Vit lesa nógv um Jósef í Gamla Testamenti. Brøðurnir vóru øvundsjúkir inn á hann. Teir koyrdu hann niður í ein djúpan brunn, og síðani seldu teir hann sum træl til Egyptalands. Teir hugsaðu, at nú fór hann at doyggja har, nú vóru teir slopnir av við hann. Hann upplivdi nógv keðiligt har, millum annað varð hann settur í fongsul, men hann bleiv ongantíð beiskur.

Hann kundi fyrigeva brøðrum sínum, tá ið teir komu til Egyptalands at keypa korn. Hvussu í verðini kundi og orkaði hann tað? Jú, tí tá ið hann var smádrongur hevði hann sæð nakað. Hann hevði sæð pápabeiggja sín Esav koma við 400 monnum at leypa á Jákup, pápa sín. Men tá ið teir hittust, bleiv eingin bardagi. Esav kom rennandi ímóti Jákupi, hann hálsfevndi og kysti hann, og báðir grótu. Beiggjarnir blivu vinir, og lívið fekk ein góðan enda. Jósef hevði sæð pápa sín fáa fyrigeving, og tí kundi hann sjálvur eisini fyrigeva – eitt ættarlið seinni.

Hatta var eitt gott sáð, ið Esav sáaði, og tað bar ávøkst í hjartanum á Jósefi. Er tað nakað, vit skulu geva børnum okkara í arv, so er tað, at vit ikki blíva óvinir, tá ið vit blíva gomul. Vit skulu sum Esav rætta armin út, ikki við einum knýttum neva, men við einari útrættari hond. Størstur er kærleikin.

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19. nov. | **Tekstur:** | Matt. 14,23; Jóh. 11,41–42; 17,9; Luk. 22,41–43; 23, 34 + 46 | **Bíbliuorð:** | Job. 22,27a |
| 26. nov. | **Tekstur:** | Áps. 12,1–17; Matt. 7,7–8 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74